betri at gera ein góðan døgurða heima, enn at fara út at eta, tí so er styttri til songina, flennir Archibald Black.

Hetta dámar monnum væl.

Kvinnan er meiri varin. Hon heldur, at tað týdningarmesta er at tosa saman, um hvat mann tímir væl, og greiðir eisini frá, at fólk ikki skulu vera bangin fyri at nýta leikur eisini, um tað kann hjálpa upp á lívið innanfyri seingjarkantin.

## Leikaloynd

– Her er alt til eitt hugnaligt kvøld, sigur sølukvinnan frá sexleikuhandlinum, loyndin.com, sum nú er komin á pallin.

Eitt borð er dekkað við dildoum ella sokallaðum hugnapinnum og øðrum hjálpitólum til kamarslívið.

Hon byrjar at koma við hugskotum, um hvussu hesi ymisku tingini kunnu nýtast, og hóast sølukvinnan viðgongur, at tað mesta er gjørt til kvinnur, so er hon sannførd um, at menn eisini kunnu gleðast saman við kvinnum, sum nýta hesi elektrisku amboð.

> *Mær dámar eisini betri at gera ein góðan døgurða heima, heldur enn at fara út at eta, tí so er styttri til songina*
> *Archibald Black*

Hon vísir eisini eitt slag av bólti við einum enda í.

– Vita tit, hvat hetta er til?, spyr hon argandi.

– Tað er fyri at fáa hana at tiga!, svarar hon sjálv.

Hetta halda nógvir vera eitt snilt amboð og ikki bara í songini.

So byrjar tosið um dukkuna hon hevur við. Ein uppblást dukka til menn, sum ikki hava nakra damu at balla seg hjá.

Hon hevur nógv hol, sum kunnu nýtast til fragd, men inni í Atlantis verður hon mest nýtt sum ein ballón, sum skjótt verður blakað millum setrini.

## Sex fyri rest

Og soleiðis heldur fram eftir lítlan steðg. Danska Katrine Berling Christensen, sum er sexologur komin á pallin.

Hon greiðir frá, hvussu menn skulu bera seg at, fyri at kvinnan veruliga skal hugna sær í songini, og kemur við langari frágreiðing um ymisku økini at mannerera við.

– Ved I, at mænd også har et g-punkt?, spyr hon.

Menn hyggja ivandi upp hvønn á annan, og onkur játtar spakuliga

– Ved I så, hvor det sidder?, spyr hon so.

– Sjey sentimetrar uppi í endanum!

Ein ungur maður á aftastu rekkju er skjótur at koma við einum boði.

Sexologurin greiðir frá, at punktið í veruleikanum er fimm sentimetrar uppi, og so er hon annars ófør at demonstrera, hvussu tað ber til at gera við kvinnu sína, so hon tímir at balla seg hjá sær eina aðru ferð eisini.

Nú lurta menn spentir, og eina løtu er pinnastilt inni, meðan sexologurin avdúkar fleiri loynidómar.

## Kvalitetspinnar

Hetta heldur fram við næsta upplegginum. Elin í Stórustovu, sexologur, men mest kend sum útvarpsvertur stendur á pallinum.

Hon er smílandi, nú hon dregur ymiskar sexleikur fram og staðfestir, at orsøkin til, at hugnapinnar eru blivnar meiri populerir seinastu árini, er, at tað nú eru kvinnur, sum sniðgeva teir.

– Nú eru teir ymiskar litir og ikki húðfarvaðir, flennir sexologurin.

Hon greiðir víðari frá, hvørjir eru góðir og minni góðir, samstundis sum hon leggur stóran dent á, at kvalitetur og prísur fylgjast væl at, og verturin sleppur at føla hvussu teir vibrerar.

– Mikið áhugavert, heldur Gunnar Nolsøe og smílist.

Men sexologurin steðgar ikki har. Hon vil hava Gunnar Nolsøe at royna eina vibrerandi keylu, sum bæði kann njótast av monnum og kvinnum.

Verturin setir seg á keyluna. Ein heldur óvand støða hjá quizmeistaranum við mjúku røddini.

– Hetta kennist bara heilt væl, sigur Gunnar Nolsøe við Elina.

Men sexologurin er ikki bara har til gamans. Hon greiðir í fullum álvara frá, at leikur væl kunnu nýtast og hjá summum veruliga kunnu bjarga parlagnum.

Men ivasamt er, um boðskapurin er komin inn hjá monnunum, nú teir hava sitið konsentreraðir í fleiri tímar og lært, hvussu teir kunnu gerast raskari menn.

## Pinnurin blívur burtur

Kvøldið er farið at líða.

Menn fara upp at forvitnast um leikurnar á pallinum. Teir grína og nerta við ljósareyðu hugnapinnarnar og byrja spakuliga at fara í allar ættir. Ein hevur okkurt við sær.

Ein pinnur er nevniliga burtur, men tveir mans taka seg saman og skipa fyri innsavnan fyri missin.

Sexologurin leitar framvegis eftir pinninum, sum kostar rættiliga nógvan pening.

Hinvegin kundi meira enn so hent seg, at onkur av teimum 90 hevur funnið fótafestið í kvinnustýrda meldrinum av góðum sexráðum og mótaklæðum, nú Føroya fyrsta mannfólk hevur verið í Atlantis í Klaksvík.



*Tað eru kvinnur, sum stýra tí mesta á kvøldinum, og hesin maðurin fekk greitt at vita, hvar skápið skal standa*



*Katrine Berling Christensen, sexologur, greiðir frá, hvussu smáar sexleikur eisini kunnu gera stóran mun í songini*



*Klaksvíkingurin Archibald Black greiðir frá, at honum dámar best at vera romantiskur heima, tí har er styttri til songina*